# Útbúgving, útbúgving og útbúgving

**HILMAR SIMONSEN**



*PhD lesandi á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum*

Tað sær eitt sindur svart út fyri tíðina. Fleiri fólk missa arbeiði bæði í Føroyum og úti í heimi. Fíggjarkreppan er av álvara farin at gera um seg, og lítið sannlíkt er, at føroyingar sleppa undan at merkja sviðan av hesum. Tá nú slík støða ger um seg, hvat er so til at taka, kann ein spyrja.

Tá kreppan herjaði í Føroyum í nítiárunum vóru tað nógvir føroyingar – serliga ung fólk – sum fóru av landinum at fáa sær útbúgving. Tað var lítið annað at gera, tí arbeiði var einki at fáa her heima, arbeiðsloysið bara vaks og vaks. At nógvir føroyingar brúktu ta annars truplu tíðina til at útbúgva seg var kortini ikki tað býttasta. Men tað harmiliga var nokk, at ein alt ov stórur partur av hesum fólkum rýmdu einaferð med alla.

Tað er ikki minst í krepputíðum, at útbúgving eigur at standa ovast á breddanum, tá tað kemur til politiskar raðfestingar. Kreppur koma, kreppur hava verið, og hendan kreppan verður neyvan tann seinasta í heimssøguni. Uttan at ljóða alt ov bjartskygdur, so er lítið at ivast í, at hon verður av fyri ella seinni, og tá er ikki so býtt at standa klárur við eini nýggjari og feskari útbúgving at taka við nýggjum avbjóðingum.

**Útbúgving í ringum tíðum**
Í hesum døgum gongur kjakið heitt um sparingarnar á Fróðskaparsetrinum. Summi siga, at talan er ikki um sparingar, tí játtanin til Setrið er ikki minkað. Men í veruleikanum fær Setrið ov lítla játtan í mun til tær menningarætlanir, sum breið politisk semja var um fyri umleið einum hálvum ári síðani. Føroyska universitetið, Fróðskaparsetrið, skuldi menn-ast og kunna taka næmingar inn til ávísar útbúgvingar á hvørjum ári, í staðin fyri sum nú bert til onkra einstaka útbúgving annaðhvørt ár.

Tá stígur er í búskapinum, og sparingar mugu fremjast, so kann tað tykjast rætt at lata sparingarnar raka javnt allastaðni. Men hvussu skilagott er tað kortini at skera niður á hesum øki, um hugt verður eitt sindur longur fram í tíðina?

Eg eri ein teirra, sum trúgvi upp á, at 3 tey mest týðandi málini at gera íløgur í er: 1) útbúgving, 2) útbúgving, og 3) útbúgving. Á hesum øki eri eg samdur við fyrrverandi bretska forsætisráðharran, Tony Blair, sum tók nakað soleiðis til. At skapa góðar karmar fyri útbúgvingum er ivaleyst nakað, sum flestu foreldur kunnu taka undir við. Hvør ynskir ikki fyri síni børn, at tey skulu fáa góðan lærdóm? Børnini eru framtíðin, men uttan lærdóm og útbúgving er ikki vist, at tey fáa eins góða framtíð, sum tey annars kundu fingið! Tað sannførir meg um, at ein eigur at vera sera varin við at tátta í innan útbúgvingarverkið, nú stígur er í búskapinum. Ikki tí at tað er nakað skeivt í at spara, tað eiga vit øll at gera, men her kann skjótt vera talan um at spara eftir hæli.

---

# Kreppa ella ei - kjarnuøkið bløðir

**VÁR Í GONG**



forkvinna
Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar

**Føroyar – eitt "wanna be" vælferðarsamfelag!**

Í hesum døgum verður nógv kjakast um, vit eru í eini kreppu ella ikki. Landsins politikarir siga so ymiskt um hesu viðurskifti, tó kunnu vit ikki longu venda hesum bakið. Nógv tekin eru í samfelagnum, sum boða frá kreppu. Hallið á fíggjarlógini er størri enn tað hevur verið í fleiri ár, og hetta hevur havt við sær, at sparingar og skerjingar eru settar í verk nógvastaðni.

Pengar vænta til fólkaskúla, til serstovnaøkið, sjúkrahúsini og eldraøkið fyri bert at nevna ein part.

**Landssjúkrahúsið**
Í fleiri ár hevur Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar víst á, at sjúkrarøktarfrøðingar hava eina alt ov tunga arbeiðsbyrðu. Í fjør var tað serliga medisinski depulin á Landssjúkrahúsinum, sum rópti um hjálp – fólk hoknaðu undan arbeiðsbyrðuni, og torført var at standa við ábyrgd fyri tí røkt - ella manglandi røkt - sum varð veitt.

Um hetta mundi vóru eingin krepputekin - í øllum førum ikki greið krepputekin. Tí er tað sera ørkymlandi at ímynda sær, hvussu alt verður, tá ein verulig kreppa rakar okkum. Sjúklingatalið er støðugt og fellur ikki, um ein kreppa herjar á.

Starvsfólkið á Landssjúkrahúsinum hevur ikki nakað lættari arbeiði, enn tey høvdu síðsta ár, og truplult er at síggja, hvussu fólk undir einum slíkum áhaldandi trýsti kunnu halda á í fleiri ár.

**Eldrarøktin**
Eldraøkið er eitt øki, sum serliga nógv hevur verið at hoyra um seinastu tíðuna. Skipað hevur verið fyri borgarafundi í Havn um hetta evni. Ikki skal ein ynskja sær at gerast gamal og røktarkrevjandi, serliga í Suðurstreymoy, sum tað ljóðar. Hesin trupulleiki hevur verið í mong ár. Hesi gomlu, sum ikki hava fingið røktarheimspláss, liggja einsamøll, ørkymlaði og bangin heima langar dagar og nætur og bíða eftir, at onkur kemur framvið. Í nøkrum førum hevur familja verið noydd at seta krampa á uttan á úthurðina, soleiðis at tann gamli ikki fer út at reika einsamallur. Sjálvandi er hetta ikki ein ynskilig loysn fyri teirra kæru, men tey verða so harðliga sperd, at tey til síðst ikki duga at síggja sær aðra loysn.

**Føroyar - ikki eitt gott samfelag fyri tey veiku**
Áðrenn vit kunnu kalla okkum eitt vælferðarsamfelag, er mín greiða hugsan, at tey veikastu skulu hava tað gott. Vit liva í eini dreymatilveru her í norðuratlantshavinum, vit spæla, at vit hava eitt gott samfelag, men vit hava bert eitt "wanna be" vælferðarsamfelag. Vit spæla, at vit taka okkum av okkara sjúku, okkara børnum, okkara veiku og okkara gomlu!

Tað kann væl vera, at tað herjar ein alheims búskaparkreppa, og vit í Føroyum eisini í løtuni hava eina tilfeingiskreppu, men stóra kreppan í landinum í løtuni er raðfestingin hjá løgtinginum, sum er at síggja á fíggjarlógini fyri 2009.

SØLA

## Maskinur til sølu

Við hesum verða fylgjandi maskinur lýstar til sølu:

| | | |
|---|---|---|
| **Cat 966 E lessari** | **árg. 1987** | **Seriunr. 94X06695** |
| **Cat 980 C lessari** | **árg. 1987** | **Seriunr. 2XD00539** |
| **Roc 410 HC H borivognur** | **árg. 1984** | **Seriunr. BRE 1205 2A** |

Øll eru vælkomin at lata inn tilboð, antin upp á alt samlað ella upp á einstaka maskinu. Tilboð upp á alt samlað kunnu verða tikin framum. Tilskilast skal, um tilboðini eru við ella uttan mvg.

Tilboð skulu vera í afturlatnum brævbjálva og vera Landsverki í hendi í seinasta lagi tann 12. februar 2009 kl. 15.00.

Til ber at síggja maskinurnar eftir avtalu við Jóan Petur Patursson, rakstrarleiðara á Maskinmiðstøðini í Kollafirði, á tlf. 540 950.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herundir tyrlupallar.*

# Tey sum skifta til sjónvarpið skifta eisini kanal

**HERI SIMONSEN**



Logikkurin hjá Anniku Mittún Jacobsen og Allani Dalsgarð er rættiliga stuttligur. Tey hava øgiliga ilt av, at fólk lurta eftir Rás2 og Lindini, serliga aftan á kl. 10. Tí skjóta tey alt fýrverkið við teimum bestu innsløgunum av millum kl. 8 og 12. Men samstundis tvinga tey eina stóra rúgvu av fólki at sløkkja fyri útvarpinum og at tendra fyri sjónvarpinum kl. 9.50. Hesi fara "av kanalini" fyri at kunna hoyra morgunlesturin í sjónvarpinum, í fyrstu atløgu borðreiddur við einari royndarmynd aftur við. Og kanska tey verða "hangandi" á sjónvarpinum. Tí tað kundi hent seg, at tingmenn kjakaðust um morgunlesturin á "Tingvarpinum", aftan á morgunlesturin. Annika og Allan bjóða bæði "Control E" og "Damage Control", um somu klokkutíð.

**PS**: Tey sum hava Televarp, síggja/hoyra eisini morgunlesturin.

**EB**: Okkara húski rindar eisini 3.500 kr. til Kringvarp Føroya